## GLÓÐIN

*…verðið umskapt við endurnýggjan sinnis tykkara.*

RÓM 12,2



lívdin
– í livd hins hægsta

Glóðin
oman Hoydalar 28
188 Hoyvík

glodin@livdin.fo
tlf. 28 00 11



# GLÓÐIN

– Lurta, samtala og biðja fyri tær

## Endamál

Ein partur av hugsjónini hjá Lívdini er, at hon skal vera ein viðkomandi samkoma fyri øll.

Glóðin er ein tænasta í Lívdini, sum er ein útrættur armur til menniskju, ið hava eitthvørt at stríðast við.  Vit kunnu samtala um evnir sum tunglyndi, ótta, sorg, vreiði, hjúnabandsviðurskifti, tvístøður o.s.fr. Talan er ikki um professionella terapi, men heldur um eitt lurtandi oyra og ein opnan favn.

Í Glóðini møtir tú persónum, sum:

- Lurta við opnum sinni
- Møta tær har tú ert
- Kunnu tosa við teg um tínar avbjóðingar ella truplu viðurskifti
- Kunnu hjálpa tær at síggja nýggjar møguleikar
- Kunnu tosa við teg um tínar avbjóðingar í tænastuni í samkomuni
- Lurta, samtala og biðja fyri tær.
- Hava 100% tagnarskyldu

Glóðin arbeiðir út frá bíbilskum meginreglum:

- Øll menniskju hava sama virði
- Menniskjan er ein ævig vera
- Gud elskar hvørt einasta menniskja

## Hvar

Samrøður fara fram oman
Hoydalar 28, Hoyvík.

## Praktiskt

Tú kanst venda tær til Glóðina við at ringja til tlf.nr. 280011 ella senda ein teldupost til glodin@livdin.fo.

Tænastan er ókeypis. Hevur onkur hug at stuðla tænastuni við gávu, kann peningur flytast á konto 9181.1325649 í Eik,
 - viðmerk “Glóðin”.